Nr. 6 | september 2014 | 67. árið

# KIRKJULIGT MISSIÓNSBLAÐ



# Jesus biður fyri okkum Joh. 17, 20-26

Joh. 17, 20-26 er endin á høvuðsprestabønini, sum Jesus bað áðrenn hann var tikin til fanga. Her biður Jesus fyri øllum komandi trúgvandi, teimum sum skulu koma til trúgv ígjøgnum boðskapin, sum lærusveinarnir skulu boða.

Tað er løgið at hugsa sær, at Jesus her biður fyri okkum, mær og tær.

Jesus biður um, at menniskju skulu koma til trúgv. At menniskju, tá ið tey hoyra Guds livandi orð, mugu hoyra gleðiboðskapin,

soleiðis at tey verða leidd út úr myrkrinum og deyðanum og inn í ljósið og dýrd Guds. Hann biður um, at hatur til sannleikan, má vendast til takksemi og tilbiðjan av Gudi.

Tað, sum Jesus leggur dent á í bønini er, at vit, sum eru trúgvandi skulu vera eitt.

Hvat merkir tað, at vit skulu vera eitt? Í tekstinum stendur, líka sum Gud og Jesus eru eitt, soleiðis skulu vit, sum eru trúgvandi vera eitt.

Eg havi altíð skilt, at Gud og Jesus eru eitt, og tað haldi er natúrligt, men at øll trúgvandi eru eitt, hetta gav mær nakað at hugsa um. Sambandi millum Jesus og Gud virkar sera friðsælt og ber brá av lýdni, semju, einari felags ætlan og eisini respekt. Hetta er ein semja, lýdni, felags ætlan og respekt, sum eg havi ilt við at fáa eyga á millum trúgvandi.

So her er aftur nakað, sum eg sum trúgvandi ikki rættiliga skilji og eg síggi eina ómøguliga uppgávu fyri mær. Mín fyrsti spurningur er: hvat kann eg gera fyri at blíva eitt við øll onnur trúgvandi? og ein annars spurningur kemur mær til hugs: hava onnur trúgvandi áhuga í at vera eitt við meg? Men tað er tað sum stendur at lesa her og hvussu kunnu vit gerast eitt? Serliga tá ið vit eru so ymisk.

Aðrastaðni í skriftini hoyra vit um einleika, at vit skulu vera eitt í sannleikanum og kærleikanum, í einleika Heilaga Andans. Tað er nokk hetta vit skulu inn uppá.

Í bønini hoyra vit ikki um Heilaga Andan. Heilagi andin skal opinbera skriftirnar fyri okkum. Tað tikist eitt sindur løgið, men boðanin um Heilaga Andan lesa vit um í kapitlunum frammanfyri.

Tað kann vera ringt at skilja ein boðskap, tá ið hann er tikin úr einum samanhangi. Hetta brotið er síðsta stykkið úr høvuðsprestabønini, sum Jesus biður áðrenn hann verður tikin til fanga. Hetta brotið er onkursvegna rættiliga aktuelt, tí tað snýr seg um okkum og tí dámar mær tað væl og fær meg at fyllast við einari góðari vón fyri okkum øllum menniskjum.

Bønin er nógv meira umfatandandi. Allur kapittul 17 er ein bøn, høvuðsprestabønin, sum Jesus biður, áðrenn hann verður tikin til fanga.

Hesin kapittul kann deilast í tríggjar partar, har Jesus biður fyri øllum trúgvandi. Hann biður fyri sær sjálvum, lærusveinunum og øllum trúgvandi, sum livdu tá og øllum, sum skulu koma at trúgva á hann, tað merkir, at hann biður fyri okkum.

Jesus byrjar við at biðja fyri sær sjálvum við atliti til komandi líðing. Her síggja vit djúpt inn í sambandi millum Faðirin og Sonin. Jesus biður Gud um at dýrmeta seg. Faðirin eigur dýrdina. Tað er løgið at hugsa um, at Jesus verður dýrmettur á krossinum. Dýrdin, sum er tað mest fantastiska, skal henda á einum so keðiligum stað, á einum krossi. Hetta hevur sum so ongan týdning fyri akkurát henda boðskapin, men eg kann kortini ikki lata vera við at hugsa um hetta við kontrastunum. Jesus var føddur í einum fjósi, uppá ein ella annan máta, eitt í okkara eygum, óverdugt stað, hann skal doyggja á ein óverdugan hátt eisini eitt óverdugt stað.

Tá ið hann er liðugur at biðja fyri sær sjálvum, leggur Jesus lærusveinarnar fram fyri Gudi. Hetta er eitt slag av forbøn. Jesus hugsar um sínar lærusveinar. Teir skulu liva víðari í hesum heimi, eisini tá Jesus er farin til Himmals.

Tá ið Jesus biður fyri lærusveinunum vísir hann á, at lærusveinarinir kenna Gud og ein Faðir og kunnu hava samfelag við hann. Gud

er opinberaður fyri teimum. Gud er fjarur og langt burturi, nú hava lærusveinarnir møtt Jesusi, tikið ímóti orðinum og skilt at Gud og Jesus er eitt. Hetta hava teir tikið til sín, sum ein part av teirra lívi, Joh.17,3. “Men hetta er hitt æviga lívið, at teir kenna teg, hin eina, sanna Guð, og tann, sum tú sendi, Jesus Krist.”

Nú hann skal fara frá teimum, biður hann fyri teimum og biður Gud verja teir ímóti heiminum. Hann sigur, at teir eru ikki av heiminum. Teir hoyra fyrst og fremst til Guds ríki. Jesus biður um, at lærusveinarnir skulu verjast ímóti tí ónda í heiminum, meðan teir skulu arbeiða fyri Guds ríki. Jesu lærusveinar eru bæði borgarar í Guds ríki og í hesum heimi. Vit plaga at siga, at tey trúgvandi eru í heiminum, men ikki av heiminum. Tey trúgvandi skulu ikki isolera seg frá heiminum. Tað er Gud, sum hevur skapað heimin og tí skulu vit elska heimin. Í heiminum er syndin við øllum tí so tað viðførir - hatur, rotinskap, oyðsl, ovurnýtslu, sjálvsøkni og nógv annað - sum er ímóti Guds vilja. Jesus veit at lærusveinarnir fara at vera freistaðir, tí biður hann fyri teimum. Hann biður ikki Gud taka teir úr heiminum, heldur tvørturímóti, hann sendir lærusveinarnar í heimin, og biður Gud verja teir ímóti tí ónda. Og biður um, at lærusveinarnir mugu verða varðveittir í trúnni, soleiðis at teir mega vera eitt. T.v.s., at hetta við at vera eitt hevur nakað við trúnna at gera.

Jesus sigur einki um, at tað er lætt at vera lærusveinur, men at lærusveinarnir hava samfelag við hann og tað setur teir fríar í hesum heimi. Hetta merkir, at tað er trúgvin, sum skapar henda einleika.

Men sum trúgvandi liva vit í heiminum, har synd, deyði og líðing herja á við øgiligari megi. Men samstundis eru tey trúgvandi ikki av heiminum. Trúgvandi er av einari aðrari verð, sum er Guds ríki. Men kortini eru vit so ymisk og hvussu skulu vit vera eitt.

Her er umráðandi at hugsa um, at tað at vera eins og eitt er ikki tað sama.

Hesin einleiki kemur ikki frá at vera limur í einari kirkju ella samkomu. Einleikin er har, andaliga og ósjónliga, men hesin einleikin kann merkjast og skiljast. Einleikin er kærleiki og dýrd og er at finna har menniskju er, sum trúgva á Jesus. Tað er tað, sum Jesus í byrjanini sigur um lærusveinarnar, teir hava ævigt lív. Joh. 17,3. “Men hetta er hitt æviga lívið, at teir kenna teg, hin eina, sanna Guð, og tann, sum tú sendi, Jesus Krist.”

Við at vera ein partur av tí kristna felagsskapinum sum trúgvandi, har Guds Orð verður boðað av Andanum, hoyrir tú til Guds ríki. Ríki, sum Jesus ynskir, at øll skulu fáa lut í. Hann er við okkum.

Tí hava trúgvandi fingið Heilaga Andan og Guds orð, Andin og Orðið kunnu skapa nýtt lív í hjørtunum á menniskjanum.

Tað, sum Jesus biður um er, at vit mugu standa fast við Navn hansara, soleiðis, at vit kunnu vera eitt. Sjálvt um vit eru ymisk bæði í sinn og skinn, so kunnu vit vera eitt yvirfyri Gudi og øðrum menniskjum, sum ikki hava fingið frið við Gud. Og vit skulu ynskja henda felagsskapin.

Sum trúgvandi eru vit ikki eins. Vit eru ikki samd. Men vit eru eitt í Harranum. Tað kristnu samkomuna kunnu vit menniskju ikki skapa, tað er ein veruleiki, sum bara Gud kann skapa, ein veruleiki, sum vit fáa lut í í dópinum og einum lívið í trúgv á Jesus. Jesus skuldi doyggja fyri, at vit skulu fáa lut í hesum og gerast eitt við onnur trúgvandi.

Líka sum at vit einki kunnu gera av okkum sjálvum, tá ið tað kemur til trúgv, men at tað er bara Gud sum kann skapa trúnna, soleiðis kunnu vit ikki gera nakað fyri at vera eitt, men tað er bara Gud, sum kann geva okkum lut í dýrdini og uppá tann mátan vera øll trúgvandi eitt.

Í Aps. 2,42. Lesa vit: “Og tey hildu fast saman um læru ápostlanna og samfelagi og breyðbrótingina og bønirnar.”

Málið við, at okkara lív saman við Jesusi og Gudi verður bundi saman við øðrum trúgvandi, og at vit harvið vera ein eind, er at verðin skal koma til trúgv. Ein syndra verð skal fáa eyguni upp fyri einleika Andans (Ef. 4,3.)

Jesus gevur okkum eisini lut í sínari dýrd. Joh. 1,14 “dýrd, sum einborin sonur hevur frá faðir sínum, fulla av náði og sannleika.” Hjá Jesusi var deyðin á krossinum ein partur av dýrdini. Felagsskapurin við hansara dýrd skal fáa verðina at síggja Gud og hansara kærleika.

Tað gjøgnumgangandi sagnorðið í bønini er “at geva”. Dýrdin sum Gud gav Jesusi, gevur Jesus víðari til okkum. Okkara uppgáva er at taka ímóti og siga takk.

Vit fáa lut í Guds dýrd við at kenna Jesus. Og tá ið vit eiga dýrdina, hava vit sum trúgvandi nakað til felag við onnur trúgvandi og tí kunnu vit gerast eitt.

Hildigunn Thomsen

# Andakt

Hann sum bjargaði okkum út úr valdi myrkursins og flutti okkum inn í ríkið elskaða sonar síns, sum vit hava endurloysingina í, fyrigeving syndanna. Kol. 1, 13-14

Endurloysing merkir, at tú ert loystur, tí ein prísur er goldin.

Tað er so nógv, sum bindur teg. Tú fært trupulleikar av ymsum slagi. Í mangar mátar hevur tú tað gott, men kortini er tað nógv, sum fyllir teg við órógv og angist. Tað kann snúgva seg um teg, tíni kæru, samkomuna ella menniskju, sum standa tær nær.

Eisini møtir tær syndin og tað, sum við henni fylgir. Hon brýtur lívið niður og lønir í síðsta enda við deyðanum. Tí snýr alt seg um hetta eina: At verða loystur frá syndini. Orðið lærir, at tað hendir ikki við at sigra á syndini, men at tú fært hana fyrigivna.

Tað hendir bert á einum stað, og tað er hjá Jesusi. Ert tú hjá honum, tá ert tú í honum. Hann tekur teg inn í alla sína frelsufyllu. Har inni ljóðar til tín: Tú hevur endurloysingina. Tú ert keyptur fríur. Jesu blóð er tann prísurin, sum varð goldin.

Tú kennir enn til syndina. Tú sært fylgjurnar av henni í tær og kring teg. Men sál tín gleðist: Eg eri loyst, eg eri fræls, eg eri sæl. Blóðið hevur fingið syndina at fara frá mær. Eg havi funnið kelduna til lív og sælu. Tak, Harri Jesus, ævigt takk!

H.E. Nissen: Han er vor fred Sólvá Syderbø umsetti

# Fællesbrev nr. 117

## Et allersidste farvel

Mbeya 1/7 2014

### Farvel Sumbawanga og Mbeya

I går morges forlod vi Sumbawanga og kørte til Mbeya, mens Emma havde sin sidste arbejdsdag, og den handlede om en sidste rengøring af huset, inden det blev overdraget til bibelskolen. I Mbeya har Peter været rundt og sige et sidste farvel på Universitet, hvor vi har undervist og nogle af de mennesker, vi fik lært at kende i Mbeya-tiden. Anne-Lene nød imens at kunne hvile en enkelt dag. Ved eftermiddagskaffen gav vi os også tid til at kigge vores gæstebog igennem, og selvom vi ikke altid har fået bedt vores gæster om at skrive, så er der mange navne fra Sumbawanga- og Mbeya-tiden, og vi må sige: Hvor har vi dog mødt mange herlige mennesker, der har været forbi i vores hjem gennem alle disse år: Familie, missionssekretærer, kollegaer, gæster fra Danmark, en hoben af volontører og mange andre.

### Afslutning i Sumbawanga

Fredag d. 27/6 kom tidligere missionær i Tanzania og missionssekretær, Svend Bernhard, for på vegne af LM for at tage officielt afsked med Rukwa, hvor LM har arbejdet siden 1978 og Brødrekirken som sådan, hvor vi har arbejdet siden 1911. En epoke er virkelig slut. Om lørdagen kom flyttebilen 10.30 i stedet for 8.00 som aftalt, og flere af de studerende, der havde været klar til at hjælpe, var forsvundet, da mange ting skulle ordnes før dimissionsfesten om søndagen. Ejeren af bilen gik dog ind på at hyre andre hjælpere. En ti tons lastbil blev fyldt – og den blev virkelig fyldt… og 12.30 var vi færdige med at læsse den. Svend var kommet på en trehjulet scooter og lidt forsinket ankom vi til middag hos den tidligere biskop, Jonas Kasitu, som Svend kendte fra gamle dage. Senere tog Peter og Svend rundt og så Bethania-hjemmene (Fremtid og håb) og Peter's House (BDM), og der blev afleveret lidt afskedsslik til børnene. Da komfurerne nu var sendt til Arusha, måtte aftensmaden varmes i bibelskolens køkken. Det er lidt af en kunst at flytte, når alt helst skal fungere til sidste øjeblik. Men vi havde heldigvis en bil, vi kunne fylde op med ting, der kan opmagasineres i Dar: Gryder, potter og pander, sengetøj, guitar, fløjte, tøj til dimissionsfesten, osv.

### Festdagen

Festlighederne begyndte med procession fra indgangen til skolen og endte ved spisesalen, hvor festen skulle være. Det kunne virkelig ses, at riget fattes penge, da meget få – i forhold til tidligere år – var indbudt – og kun et enkelt sangkor fra vores lokale menighed mod tre kor sidste år fra forskellige menigheder. Efter selve dimissionsfesten for de 4 evangelister, der afsluttede deres 2 års studium, var der afsked med LM. Dvs. først overrakte Peter officielt **afskedsbogen** til den tidligere biskop og formanden. Den nyvalgte biskop kunne ikke deltage, da han var til møde i en anden del af landet. Siden fik den menighed vi har hørt til, når der ikke var gudstjenester på bibelskolen, overrakt **en stor alterbibel** med tak for fællesskab og tjeneste gennem årene. Siden fik koret en **'Jesus elsker dig' T-shirt** til alle medlemmerne. Bibelskolen og lærerne havde allerede fået afskedsgaver, så ind imellem de forskelle

hilsener og kommentarer blev der overrakt afskedsgaver til de øvrige ansatte, lærernes hustruer, de studerendes hustruer og til sidst de studerende. **Bibler, kitenge og studiebøger.** Uden hustruernes hjerte bag f.eks. de studerende, så ville det stå sløjt til. De tager virkeligt et slæb, mens deres mænd er væk, så det ville vi gerne påskønne. Alt dette blev afsluttet med en til dagen skrevet **afskedssang** af Peter over bogens tema: Farvel – vi ses på jorden eller i Himlen. De studerende spillede på fløjter, xylofoner, trommer og andre rytmeinstrumenter, mens Peter sammen med koret udefra tog sig af guitarerne. Alle i salen sang med på afskedsangen. Herligt. Efter at det hele var overstået var der mulighed for at se Peters **afskedsudstilling**, der viste billeder fra LM's arbejde i Brødrekirken, m.v.. Derefter havde forstanderen ordet med tak og vi fik overrakt gaver (kjoler og skjorte). Og de studerende havde fået en kunstner til at male et portræt af os hver, som vi fik i afskedsgave. Fornemt gjort af fattige studerende!

Derefter holdt stiftets formand kirkens officielle afskedstale til LM – og den blev holdt på engelsk uden oversættelse – så den kunne forstås i Danmark, men mange af de tilstedeværende nok blev hægtet af. Lad os blot være ærlige og indrømme (uden at vi ser skævt til dem, der ikke kan swahili – for andre sprog kan jo oversættes): Det var godt, at Svend kunne og ville komme, da han kunne forstå alt, hvad der foregik; var selv en del af den historie, det handlede om, og kunne holde sin afskedstale på et sprog alle forstod. Så kan afskedskontakten til de tilstedeværende ikke blive bedre. Og den var god. Tak for indsatsen på LM's vegne, Svend! Svend fik en skjorte i gave og et certifikat med påskønnelse af LM's arbejde til væggen på Industrivænget. Og Anne-Lene fik en taske og Peter en skjorte. Og kirken fik 10.000 kr. i afskedsgave fra LM.

Siden skulle der hilses på og tages afsked, udstillingen pakkes ned, dvs. alle plancher kom i plastiklommer og i en mappe, så de kunne bevares i kirken for eftertiden. Og så kom den ene efter den anden forbi vores hus for at sige farvel, og om aftenen havde Svend inviteret os på middag i byen. En lang og fin dag var slut – og så kunne vi fortsætte med at pakke bilen…

Tak for al støtte fra Kirkjuligt Missiónsfelag og Luthersk Missionsforening gennem årene i Sumbawanga og Mbeya og tak til alle jer, der har bedt for os og har støttet Kirkjuligt Missiónsfelag og Luthersk Missionsforening økonomisk, så det har været muligt for os at tjene disse steder.

Vi ser frem til at møde jer på Færøerne eller i Danmark.

Kærlig hilsen

og Guds fred

Anne-Lene og Peter



# Ein eydnuleysur millióningur

av Bill Sanger

Hetta er ein frásøgn um ein mann, sum leitaði eftir friði og eydnu. Tá ið hann var vorðin millióningur, sá hann, at enn var tað okkurt, sum restaði í. Hansara leitan endaði ikki, fyrr enn hann hevði funnið **Hann**, sum kemur til okkara sum endaliga svarið upp á alt, vit leita eftir.

Tá ið eg fekk mítt egna virki, helt eg, at um eg gjørdist millióningur, fór eg av sonnum at gerast eydnusamur. Hetta var í 1962. Í 12 ár hevði eg arbeitt í sama virki, fyrst sum bókhaldari, síðani sum sølumaður og at enda sum fulltrúi. Allar pengarnar, sum eg forvann, setti eg í bankan, og tá ið eigarin ætlaði sær at selja, keypti eg fyritøkuna.

Eg arbeiddi hart at fáa tað at ganga. Tey fyrstu árini arbeiddi eg tólv tímar dagliga. Áðrenn eg fylti 50, var eydnast mær at gerast millióningur. Men eg takkaði ikki Gudi fyri signingar hansara. Eg kendi hann als ikki. Eg bað ikki, og heldur ikki las eg í Bíbliuni.

Av tí at eg nú var millióningur, ætlaði eg mær ikki at stríðast so nógv. Eg ætlaði mær at taka mær av løttum, hava tað gott, arbeiða minni og fara at liva av álvara. Tá fór eg at blíva eydnusamur.

So fór eg at ferðast runt allan heimin - til Evropa, Japans, Avstralia, Nýsælands, Fijioyggjarnar, Hawaii. Eg vitjaði næstan allar oyggjarnar í Karibiahavinum og harumframt Rio de Janeiro, henda vakra býin í Brasilia. Men gjørdist eg eydnusamur av øllum hesum? Nei!

Eg átti fleiri vøkur hús. Í einum av heimum okkara høvdu vit innandura svimjihyl og baðstovu. Húsini vóru gjørd úr sedrisviði og múrsteini, og tey vóru á einum stórum jarðarstykki. Bilarnir, sum eg átti, vóru av besta slagi, Cadillac og Continental. Tann seinasti, eg keypti, var Mercedes Benz. Bar alt hetta mær ta eydnuna, ið eg leitaði eftir? Nei!

Eg átti pening at keypa alt, eg ynskti mær - stuttleikabát, flogfar, hvat sum helst. Kortini var eg eydnuleysur, enntá tunglyntur. Eg skilti als einki, hví so var. Eg leitaði upp ein sálarlækna at vita, um hann dugdi at siga mær, hvat ið tað mundi vera, sum bagdi mær. Men hann fekk ikki hjálpt mær. Eg visti ikki, hvat ið tað var, ið eg saknaði, so eg helt á at leita.

At enda kom eg til ta niðurstøðu, at um eg fór frá við eftirløn og slapp undan at stúra fyri virkinum, fór eg heilt vist at gerast eydnusamur. Eg keypti eini hús á Paradísoynni Nassau á Bahamaoyggjunum. Har høvdu Donna, kona mín, og eg verið og ferðast mangar ferðir. Veðurlagið har er mest sum fullkomið. Har eru meir enn 300 sóldagar um árið. Luftin er rein, sjógvurin er ikki dálkaður, á strondunum breiðir hin fínasti korallsandurin seg. Heilt tætt við hús okkara var størsta spælikasino í øllum Karibia.

Eg hevði spælt um pengar í meir enn 20 ár - ymsastaðni um allan heimin. Á serligum "spælitúrum" gera tey eftir ynskjum tínum. Tú fært eina ókeypis flogferð, ókeypis hotell, besta matin, sum er at fáa, vín og undirhald. Alt er ókeypis við teirri treyt, at tú spælir. Tað er skilligt, at hesi spælistøð eru vís í, at tey fara at

vinna rættiliga nógvan pening burtur úr tær kortini.

Fyrsta veturin, vit vóru á Paradísoynni, vóru vit í spælihøllini hvørt kvøld, tí so høvdu vit okkurt at gera um kvøldarnar eftir sólsetur.

Gjørdi pensionistatilveran meg eydnusaman? Nei! Tað var enn okkurt, sum restaði í.

Ein dagin, tá ið vit vóru niðri á strondini, sóu vit eini ung hjún. Tey høvdu eina lítla smágentu við sær. Bara annað foreldrið leyp á bláman í senn, meðan hitt ansaði eftir barninum. Vit bjóðaðu okkum at hyggja eftir barninum, so at tey kundu svimja saman og stuttleika sær. Tey takkaðu okkum og kvikaðu sær útí.

Aftaná prátaðu vit saman. Tey vóru trúboðarar úr Kanada og vóru offiserar í frelsunarherinum her á Bahamaoyggjunum, Trickey kapteynur og frúa. Tá ið tey fóru, bjóðaðu tey okkum til møtini í salinum.

Konan og eg høvdu ikki verið í kirkju í meir enn 30 ár. Eg var uppaldur at ganga í kirkju; men tá ið eg flutti heimanífrá, gavst eg við tí. Helst hugsaðu vit als ikki um Gud, uttan tá ið vit vóru í neyð. Jesus var bara eitt søguligt navn. Vit trúðu ikki upp á nakað. Kortini gjørdu vit av at vitja frelsunarherin, tí hesi fólkini vóru ógvuliga dámlig, og vit høvdu ongar vinir her. Vit vórðu boðin hjartaliga vælkomin, so vit hildu á at fara hagar ferð eftir ferð.

Tá ið ein tíð var umliðin gingu vit fast á møti hvønn sunnumorgun, og viðhvørt gingu vit eisini á kvøldmøti. Vit trivust har, og vit vóru farin at gleða okkum til sunnudagarnar. Hesi hjúnini gjørdust vinfólk okkara. Tey vóru so glað og nøgd, hóast tey áttu lítið. Tað skiltu vit ikki. Her gekk eg og hevði ríkiligt av pengum at keypa mær alt, eg hevði hug til, og kortini var eg eydnuleysur. Eg var eitt eyðkent dømi uppá, at pengar gera teg ikki glaðan.

Kapteynurin og eg skiftu orð um átrúnað, men tað bleiv bara til prát. Hann gav mær eina Bíbliu; men vit lósu ikki í henni. Hann bað borðbøn, vit bóðu ongantíð. Men av tí at tey vitjaðu okkum so ofta, góvust vit at drekka cocktail dagliga. At enda drukku vit als ikki alkohol. Vit góvust eisini at ganga í spælihøllina. Fyridømið, sum tey vístu okkum gjøgnum sítt dagliga lív, hevði stóra ávirkan á okkum. Vit fóru so smátt at skilja, at nógv av tí, sum fólk halda krevst fyri at gerast eydnusamur, er als ikki rætt yvirhøvur, so sum at drekka, fara út at stuttleika sær og mangt annað.

Veturin eftir fóru vit aftur til Bahamaoyggjarnar. Vit hildu á at ganga á møti hjá frelsunarherinum, og vit byrjaðu aftur samveruna við kapteynin og frú Trickey. Tey høvdu verið til møtirøðina hjá Billy Graham í Florida, og tey søgdu okkum um tey nógvu túsundtals menniskjuni, sum fóru fram fyri at taka ímóti Jesusi Kristi. Vit høvdu hoyrt um kristin, sum vóru "fødd av nýggjum", men vit skiltu ikki, hvat ið tað snúði seg um. Hjúnini greiddu gjølla alt fyri okkum; men vit vóru ivasom. Hetta var einki fyri okkum, hildu vit. Vit vóru ikki fús at taka eitt sovorðið stig. Innast inni kendu vit, at vit ikki vildu sleppa tí glæstritilveruni, vit livdu.

Kapteynurin gav okkum bókina "Fred med Gud" hjá Billy Graham. Eg hevði sæð Billy Graham einar tvær ferðir í sjónvarpi, men eg skifti altíð til eina aðra rás. Hann var ikki ein persónur, sum eg vildi síggja og hoyra. Hví skuldi eg lesa hesa bókina? So fór eg at hugsa. Kanska var okkurt um hetta kortini. Hevði eg ikki roynt allar aðrar møguleikar? Eg gjørdi av,

at eg skuldi lesa nakrar kapitlar. Tað kundi borið á, at eg fann tað, sum leitaði eftir. Kanska var hetta svarið. Eg fór at hugsa um at taka ímóti Jesusi Kristi og broyta kós her í lívinum. Eg vildi fegin blíva frelstur, men var fullur av iva og fyrivarni.

Donna las eisini bókina. Meðan hon las hana, varnaðist eg, hvussu hon broyttist. Eg hevði hildið, at eg fór at verða til reiðar at fara fram langt áðrenn Donna. Men eg fór skeivur. Vit tosaðu saman um tað, og bilsin varð eg, tí hon segði, at hon var villig at fara fram, um eg eisini var villigur.

Spurningurin var nú, nær vit skuldu fara. Vit hildu, at vit fóru at kenna tað á okkum, tá ið løtan var komin, til dømis undir einum sangi, ella meðan tey bóðu. Frelsunarherurin í Nassau hevði bjóðað einum trúboðara at hava eina serliga møtirøð. Tað var brigader Edward Deratany, ein eftirløntur starvsmaður í frelsunarherinum. Vit vóru til møtini hjá honum. Hann kendi á sær, at vit vóru tætt við at taka eina avgerð, og vit sóu, hvussu glað hann og konan vóru fyri tað.

Boðskapurin hevði stór ávirkan á meg. At enda gjørdu vit av at fara fram. Vit høvdu hugsað nóg leingi. Nú var tíð uppá at fara í trúgv. Vit máttu geva okkum upp í hendurnar á Harranum.

Á næstseinasta møtinum í hesi møtirøðini tann 13. november 1985, fóru konan og eg hond í hond oman eftir miðgongini og tóku ímóti Jesusi sum okkara Frelsara og Harra. Tað var næstan, sum tá ið vit blivu gift. Donna var so fjálturstungin, at hon kendi, at tað oyðilegði løtuna fyri okkum. Eg minti hana á, at hon var eisini bangin, tá ið vit giftust, men tað hevði ikki oyðilagt hjúnalagið. Tað var so gott, at vit høvdu gjørt av at fara fram saman, og at vit bæði kendu tað á sama hátt.

Vit vóru ógvuliga rørd, tá ið vit komu heim eftir møtið. Í fleiri tímar sótu vit og prátaðu saman. Friður og nøgdsemi fyltu okkum, og gleðin, sum vit fingu tað kvøldið, hevur varað til dagin í dag. At enda hevði eg funnið tað, sum eg leitaði eftir. Og tað var so einfalt. Tað hevði verið har, beint framman fyri nøsini á mær, alla tíðina.

Nú skilji eg, at eydnan liggur ikki í tí, tú eigur, men hvørjum tú trýrt á. Eg hevði bíðað so leingi, kastað burtur so mong ár, meðan eg alla tíðina leitaði eftir gleðini á nýggjum støðum og í ognum. Á, sum eg hevði mistikið meg skammiliga. Og sum tað eru mong onnur menniskju, sum eisini mistaka seg so skammiliga.

Nú, tá ið vit eru fødd av nýggjum, royna vit at liva soleiðis, sum Jesus vil, at vit skulu liva. Vit lesa tríggjar kapitlar hart saman úr Bíbliuni hvønn dag. Vit biðja eisini hart, á knæ. Vit eru á møti hvønn sunnudag, og vit hjálpa kapteyninum og frú Trickey so gott, sum vit kunnu.

Eg eri vísur í, at Gud sjálvur bar tað soleiðis í bandi, at vit møttu Trickey-familjuni niðri á strondini, og eg veit, at hann skal vísa okkum, hvat ið vit skulu gera við lív okkara. Vit ynskja at tæna honum.

Vit eru so takksom, at Jesus kom inn í lív okkara. Hvønn dag, tá ið vit biðja, siga vit:

"Takk, á Gud, at Tú frelsti meg,

takk, at eyga Títt bar við meg,

takk, at Harran Jesus Tú gav,

takk fyri náðinnar djúpa hav."

Effie Campbell umsetti

# Síðsti silvurpengin

Tað var eitt myrkt sunnukvøld. Klokkan var farin av tíggju, tá ið ein vánaliga ílatin fremmandur maður fylgdi tí nítjan ára gamla Hudson Taylor til ein av fátækrabýlingunum í Hull.

Hudson hugdi varisliga uttan um seg. Hann hevði gingið í hesum gøtunum fyrr. Tær vóru einki hugnaligar í dagslýsi, og upp aftur verri nú á náttartíð. Glæman frá gøtulyktini skein yvir á gøtuhornið, og illgrunaverdir persónar hvurvu inn gjøgnum tey skroypiligu portrini. Hetta var av sonnum eitt stað, har eingin ynskti sær at fylgjast við einum landastroki, eftir at tað var vorðið myrkt. Men skuldi hann fara til Kina, so mátti hann venja seg við hetta.

“Hví baðst tú ikki ein katólskan prest koma at biðja fyri konu tíni?” spurdi hann henda fremmanda og var næstan glaður at hoyra egnu rødd sína. Maðurin var komin til Taylor og hevði sagt, at kona hansara lá at doyggja, og hann spurdi hann, um hann kundi koma og biðja fyri sál hennara.

Hudson Taylor var beinanvegin fúsur at fara við honum; men nú fór hann at hugsa seg gjøllari um. Hesin maðurin var óivað katolikkur. Um kona hansara av sonnum lá at doyggja, hví var hann ikki farin til ein katólskan prest? Teir katólsku prestarnir arbeiddu júst í hesum býlinginum í Hull. Hví mundi hann vera farin til ein protestant?

“Eg var hjá presti,” segði maðurin, “men hann vildi ikki biðja, fyrr enn eg var førur fyri at gjalda, og eg eigi als ongar pengar yvirhøvur, og upp aftur minni at geva presti.”

“Kona hansara doyr so statt í hungri,” hugsaði Hudson. Hann fór at kenna seg illa til passar, meðan hann tvíhelt um myntin í lumma sínum. Hann átti bara henda eina silvurpengan umframt tveir bollar og eina skál við greyti heima á kamarinum. Kundi nakar væntað, at hann skuldi geva hesum fólkunum silvurpengan?

Hann gjørdist argur, tí segði hann heldur brigslandi: “Hví ert tú ikki komin fyrr og hevur biðið um hjálp? Kona tín liggur at doyggja, og familjan svøltar, og tú gert einki fyri tey.”

“Eg fór og spurdi,” svaraði hann sorgarbundin, “men tey bóðu meg koma aftur í morgin, og eg stúri fyri, at kona mín er farin, áðrenn morgindagurin er komin.”

Hudson bleiv rørdur. Hansara støða var vánalig, men støðan hjá vinmanni hansara var so mangar ferðir verri. Hevði hann bara havt tvær myntir, so skuldi hann gleðiliga givið aðra.

Brádliga fór maðurin inn gjøgnum eitt portur og inn í ein myrkan garð. Hudson hevði verið har fyrr. Hann mintist tað skilliga. Fólkini, sum búðu her, høvdu hildið hann fyri gjøldur. Tey høvdu pettað traktatirnar sundur, sum hann hevði givið teimum, og tey hóttu hann, at um hann kom aftur har, so skuldu tey... Katólski presturin við krusifiksinum var vælkomin, men ikki hesin ungi protestantiski trúboðarin.

Hudson var farin haðani so høviskur og varisliga, sum hann kundi, og hann hevði ongantíð trúð, at nakar haðani fór at bjóða sær at koma aftur. Sum hann nú trilvaði seg upp eftir hesi ridlandi trappuni til eina av teimum innaru íbúðunum, ynskti hann so staðiliga, at eingin skuldi hoyra, at hann var her. Tað lætnaði hjá honum, tá ið maðurin læt einar dyr upp, og teir trinu innum.

Teir vóru komnir til heimið hjá hesum manni, men sum tað sá út. Eitt lítið ljós kom frá einari lampu. Ongar gardinur vóru fyri

vindeygað. Gólvfjalirnar vóru úr óhølvaðum timbri. Næstan einki innbúgv var har.

Á einari hálmmadrassu yviri í horninum lá hin raka, útlúgvaða konan og undir liðini á henni eitt barn, sum bara var tveir dagar gamalt. Eini fýra-fimm onnur børn stóðu ella lógu á gólvinum. Tey vóru í klæðum, sum annaðhvørt vóru ov stór ella ov smá. Skógvar og sokkar høvdu tey ikki. Tey hugdu við stórum, svongum eygum móti pápa sínum og hesum fremmanda manninum.

Hudson stóð púra kvirrur mitt á gólvinum. “Á, um silvurpengin hevði verið vekslaður í tvey,” hugsaði hann, ”tá hevði eg givið teimum fátæku annan.”

Hann mintist, at hann var prædikumaður og fyrireikaði seg at fara út til Kina sum trúboðari. Hann mátti tosa við hesi fólkini um Gud.

“Eg veit, at tit eru illa stødd í løtuni,” segði hann sveittandi, “men fellið ikki í fátt. Vit hava ein Faðir á himli, sum hevur umsorgan fyri okkum, og um vit líta á hann...”

Orðini sótu føst í hálsinum á honum. “Tín hyklari,” ljóðaði tað innan í honum. “Tú kanst siga øðrum frá einum Faðiri, sum hevur umsorgan, men tú torir ikki sjálvur at líta á hann, uttan at tú hevur pengar í lummanum.”

Hudson gavst at prædika fyri teimum. Tað nyttaði einki. Familjan hugdi tigandi at honum. Hann stóð har í frakka og hatti og leðurskóm. Sjálvt um klæðini vóru slitin og skógvarnir holutir, var hann ríkur samanborið við tey.

Hvussu kundu tey vita, at hann bara átti ein silvurpenga í verðini. Á, hevði hann bara átt meir, so hevði hann givið teimum.

Hann vendi sær á móti manninum. “Tú baðst meg biðja fyri konu tíni, latið okkum biðja nú,” segði hann. “Tað verður lættari at biðja,” hugsaði hann og fall á knæ niðri á gólvinum. Men hann hevði ikki fingið tíð at siga: “Faðir okkara á himli,” fyrr enn røddin ljóðaði aftur: “Tú hevur ein silvurmynt niðri í lummanum.” Men hann bað bøn sína og fór á føtur aftur.

Tá ið hann gjørdi tað, hugdi maðurin upp á hann í ráðaloysi og segði: “Fyri Guds sakir, hjálp okkum!”

Neyðars Hudson, hvat skuldi hann gera? Brádliga kom orðið úr fjallaprædikuni fram fyri hann: “Gev tí, ið biður teg - gev.” Seigliga stakk hann hondina niður í lumman. Hann mátti geva alt.

“Tit halda kanska, at eg eri ríkur, men í veruleikanum er hetta allur peningurin, sum eg eigi í hesi verð; men tað, sum eg havi sagt tykkum, er satt. Gud er sanniliga ein Faðir, og vit kunnu líta á hann. Eg kann líta á hann.”

Hann gjørdist sjálvur bilsin um munin, nú peningurin lá í hondunum á manninum. Hann visti, at hann kundi líta á Gud. Hann segði farvæl við familjuna og kvikaði sær niður gjøgnum tær ridlandi trappurnar, og hann fór til gongu gjøgnum gøturnar við sangi í hjartanum.

Tá ið hann kom aftur til kamarið í Drainstrætinum og fyrireikaði náttturðan, eitt fat við greyti, kendi hann seg eydnusælan sum ein kongur. Meðan hann át, kom orðið til hansara, at tann, sum gevur teimum fátæku, lænir Harranum. Hann mintist ikki, hvar ið tað stóð, men tá ið hann bað kvøldbønina, segði hann: “Eg vóni, at tú skjótt rindar mær lánið aftur, tí annars eigi eg einki til døgurða í morgin.”

Morgunin eftir var hann tíðliga á fótum. Meðan hann sat og át úr greytarfatinum, hugsaði hann, at hetta var nóg mikið at byrja dagin við, men neyvan nóg mikið til allan dagin. “Eg undrist á, nær Gud man fara at

gjalda mær lánið aftur?” segði hann við seg sjálvan.

Tá hoyrdi hann fótafetini hjá postmanninum í gongini; men av tí at hann næstan ongantíð fekk post mánamorgun, brýggjaði hann seg ikki um tað.

Bara nøkur sekund seinni stóð vertskonan á gáttini og segði: “Tú hevur fingið ein lítlan pakka.”

“Stóra takk!” segði Hudson bilsin. Hann tók pakkan og hugdi at skriftini; men hon var ókend. Poststemplið var so ótýðiligt og kámt, so har fekk hann onga hjálp.

Tá ið hann læt pakkan upp, sá hann, at eitt pappír og einir handskar lógu í. “Hvør sendir mær handskar?” hugsaði hann bilsin.

Tá datt okkurt úr øðrum handskanum. Tað var okkurt blankt. Hann boygdi seg niður og tók tað upp. Tað var ein gullmynt. Hann hugdi bilsin at henni. So hugdi hann aftur í pakkan og eftir skriftini og poststemplinum at vita, hvør ið mundi hava sent hann, men til fánýtis. Hann kom ongantíð framá, hvaðani pakkin var komin.

Brádliga gjørdist tað honum greitt, at hetta var tíggju ferðir so nógvur peningur, sum hann hevði givið. At veita Gudi eitt lán gav altso eina sovorðna høga rentu eftir tólv tímum. Tað var ein slíkan banka, honum tørvaði.

Effie Campbell umsetti



# Søgan um Dávid og Goliat



1. Sám. 17

Vit kenna øll søguna. Vit hava hoyrt hana í sunnudagsskúlanum og elskaðu at hoyra hana upplisna úr einari myndabók.
So hví skulu vit venda aftur til eina so skelkandi hending? Tí, tá ið vit steðga á og hyggja gjøllari at henni, so er okkurt við hesi søguni, sum hevur týdning í samband við ta andaligu krígsførslu, sum vit uppliva á okkara døgum.

Tað er áhugavert at hoyra, hvussu hesir báðir herarnir – hjá ísraelsmonnum og filistum – høvdu stillað seg upp til bardaga, uttan at nakar lyftir eitt svørð. Ikki eitt spjót verður kastað. Eingin verður dripin. Har er bert ein rúgva av eyðmýkjandi og spillandi orðum!

Leikpallurin er settur. Á aðrari síðuni stendur ein kempa, ein hart vandur krígsmaður. Erpin og uppblástur - eingin hevur enn vunnið á honum – stendur hann har og tekur ímóti avbjóðingini: Sendið mær tykkara besta mann! Vit skulu berjast. Tann, ið tapir, skal tæna vinnaranum. Tað er ikki neyðugt, at tit doyggja

allir samlir í bardaganum. Er tað ikki betri, at ein maður doyr fyri allar?

Sum hatta er skilagott, heldur tú ikki?

Og møt so mótstøðumanni hansara. Nei, ikki Dávidi. Tað er Saul, kongurin Saul, hægsti maður í Ísrael, ein vandur hermaður. Heldur eingin hevur enn vunnið á honum! Saul móti Goliati. Hetta er tann bardagin, øll væntaðu og longdust eftir. Alt lívið hjá Sauli hevði verið ein fyrireiking til hesa avgerandi løtu.

Og hvar var so Saul? Hann goymdi seg í tjaldinum. Hann ætlaði sær ikki at berjast móti kempuni. Tað hevði Dávid heldur ikki ætlað sær. Hann kom har, av tí at hann fór eini ørindi fyri pápa sín, Ísai. Saul visti, at hann kundi ikki vinna. Uttan iva bað hann – um ein frelsara. Hvønn sum helst, bara ikki hann sjálvur, hugsaði hann. Hann vildi skriva ein kekk út upp á helvtina av sínari persónligu ogn til tann, sum drap kempuna. Hann vildi geva vinnaranum vakrastu dóttur sína. Hvat kundi hann annars bjóða fram og soleiðis stuðla onkrum til? Jú, skattafrælsi alt lívið fyri alla familjuna hjá vinnaranum. Tað mátti avgjørt verið nóg stór grund at útvega ein vinnara.

Eingin steig fram – í 40 dagar – til ein tannáringadrongur steig fram.

Tað er altso støðan. Tú kennir endan á søguni. Handa søgan er søgd og endursøgd, til einki undranarvert er eftir. Kortini áttu vit at gjørst hamskift, ja, enntá sera skakað um tað, sum hendi á hasum vígvøllinum.

Latið okkum hyggja nærri eftir Dávidi. Minst til, hann er ein drongur – hægst 18 ár! Hann hevði ongar kropsligar fyrimunir. Hann var ikki ríkur. Hann kom ikki frá einari fínari familju. Hann hevði ikki gingið á lærdum háskúla. Hann hevði eingi serlig evni – uttan tey musikalsku, og tey gera hann ikki endiliga skikkaðan til eina offisersútbúgving í nøkrum heri.

Sjálvandi hávirða vit Dávid, av tí at hann fór ímóti einum fíggindа, sum tað ikki bar til at sigra á – og kortini vann Dávid. Tað syrgiliga er, at Dávid átti ikki at verið tann einasti. Hann gjørdi bara tað, sum ein og hvør í Ísrael kundi havt gjørt – um tey bara høvdu hugsað sum Dávid.

Hvat var tað, sum gjørdi Dávid so serstakan? Ikki hansara dugnaskapur ella dirvi, hóast hann óivað hevði bæði. Nei, hann var serstakur av einari orsøk. Bíblian sigur, at hann var ein maður eftir Guds hjarta (1. Sám. 13,14). Wauw! Hvussu hevði Dávid fingið hesa guddómligu viðurkenning? Kunnu vit eisini fáa hana?

Kanska kann fyridømi hjá Dávidi ávirka lív okkara í dag. Kanska kann hann júst vísa okkum, hvussu vit kunnu standa andlit til andlits og berjast við tær kempur, vit standa yvirfyri. Hugsa um hetta: Dávid sá tað, sum øll onnur sóu. Dávid hoyrdi tað sama, sum øll onnur hoyrdu. Kortini hugsaði Dávid, sum eingin annar hugsaði. Tí segði Dávid tað, eingin annar segði, og gjørdi tað, sum eingin annar gjørdi.

Tað tykist, sum Dávid visti okkurt, sum eingin annar tóktist at vita. Men tú kanst vita tað, Dávid visti. Tú kanst gera tað, Dávid gjørdi. Gud ynskir at geva tær alt tað, hann gav Dávidi, so tú kanst vinna á kempunum nú á døgum.

Bróðir Andreas

Effie Campbell umsetti.

**Vit hava fingið áheitan um at seta hetta í blaðið. Úr Tro og Mission.**

Luthersk Missions landsstyrelse har på sit møde den 22.-23. august besluttet, at opfordre alle LM-enheder til på deres førstkommende møde at bede for de forfulgte kristne.

”Især i Syrien og Irak er situationen for de kristne desperat. De er vores brødre og søstre, og når ét lem lider, så lider alle lemmerne med,” skriver generalsekretær Jens Ole Christensen i en direkte henvendelse til alle formænd for LM’s kredse, frimenigheder og ungdomsforeninger. Det er først og fremmest organisationen Islamisk Stat, som driver mange kristne i Syrien og Irak på flugt. Nogle fanges og andre dræbes. Selv forsigtige skøn taler om halvering af antallet af kristne i Irak på kort tid. Alle, der vil bede med, er velkomne til at gøre brug af nedenstående bøn. Den er forfattet af en medarbejder i Åbne Døre International, oversat og trykt i avisen Tro & Mission nr. 15/2014.

**Beskyt dem mod deres forfølgere**

Himmelske far, suveræne og almægtige Gud, vor frelser, du som trofast holder dine løfter, vi bønfalder dig for vores lidende trossøskende i Irak. Se til dem i deres nød, vær barmhjertig og hold dem oppe. Forsvar dem som dine børn. Beskyt dem mod deres forfølgeres onde hensigter og styrk deres tro, når de oplever trængsler for Jesu navns skyld.

Far, vi læser i 2 Krønikebog 20,23, at du i gammel tid gjorde det sådan, at dit folks fjender ødelagde hinanden. Nu beder vi om, at der må blive splittelse og selvødelæggelse blandt jihadisterne, som angriber dit folk.

Herre, ligesom du engang delte Det røde Hav for at lave en tryg vej for dit folk, da de flygtede fra Faraos hær ( 2 Mosebog 14,21-22), beder vi nu om, at du åbner en vej til tryghed for dit folk, som flygter i stor frygt.

Vor Gud, dit ord forudsiger, at Satan vil føre krig mod din kirke, ikke mindst, fordi han ved, at hans tid er kort (Johannes’ Åbenbaring 12,12). Men du har lovet at gribe mirakuløst ind for at skabe et tilflugtssted i ørkenen for den kirke, som fjender ønsker at ødelægge (Johannes’ Åbenbaring 12,14-16).

Giv dit lidende folk, at de må være sejrherrer ved Lammets blod og ved deres vidnesbyrds ord (Johannes’ Åbenbaring 12,11).

Kære far, Jesus forudsagde, at hans folk ville blive hadet af alle folkeslag og udsat for trængsler (Matthæusevalgeliet 24,9), sådan som vi nu ser, at det sker med de hellige i Irak. Tillad ikke, at de falder fra troen eller forråder hinanden, og bevar deres kærlighed fra at blive kold (Matthæusevangeliet 24,10-12). Hør Rakels klageråb i Irak og Kurdistan, når hun græder over sine børn (Jeremias’ Bog 31,15).

Al nådes Gud, se i barmhjertighed til dem, der forfølger dit folk i en falsk guds navn.

Vis nåde mod dem, der korsfæster og halshugger de hellige i Irak, ligesom du engang forvandlede Saul fra Tarsus’ hjerte, da han var den ledende forfølger af din kirke (Apostlenes Gerninger 9,4-5), og ligesom Jesus bad dig om at tilgive dem, der torturerede ham på korset (Lukasevangeliet 23,34). Åbenbar din nåde og herlighed for dem, sådan at de omvender sig, tror og bliver frelst.

Herre, vi beder om, at du sender din Ånd, som kan inspirere de kristne til at opleve trøst og tryghed, sådan at vi kan ære vores søstres og brødres martyrium ved at leve frimodigt og stærkt for Jesus.

Vi beder om, at vi ikke selv kommer til at hade, når vi ser det had, som er virksom i dem, der fører krig mod vores brødre, men at vi i stedet må leve mere helligt og fyldt af bøn til Kristus i denne onde verden.

Vi beder i hans navn, som elsker os og har løst os fra vores synder (Johannes' Åbenbaring 1,5), ham, som du har givet som hoved over alle ting til kirken (Efeserbrevet 1,22), din søn Jesus Kristus: Kom, Herre Jesus. Amen.

*Oversat til norsk af Stig Magne Heitmann og bragt i den norske avis Dagen. Til dansk af Kaja Lauterbach.*

## Ársfundur hjá Kirkjuliga Missiónsfelagnum 2014

Ársfundur Kirkjuliga Missiónsfelagsins verður í døgunum 26. – 28. september í Emmaus í Klaksvík. Høvuðstalari verður Dan Hessellund úr Danmark.

**Fríggjakvøldið**

Kl. 20 Ungdómsmøti v/ Dan Hessellund

**Leygardagin**

Kl. 16 Bíbiltími v/ Dan Hessellund

Nátturði

Kl. 20 Møti v/ Dan Hessellund

**Sunnudagin**

Kl. 16 Møti v/ Silasi og Peter Olofson

Kl. 18 Møti v/ Dan Hessellund

Nátturði

Vælkomin til løturnar um Guðs orð – Róm 1,16.

**Stýrið**

Útgevari
Kirkjuliga Missiónsfelagið
undir Hálsi 14
Fo- 700 Klaksvík
t- postur: kmf@kmf.fo

Heimasíða: www.kmf.fo
Ábyrgd: Kristian Thorleifsson
tel: 212856
Prent: KMF
Konta: 9181- 495.337.3

Kirkjuligt Missiónsblað
kemur út 8 ferðir um árið
(februar, mars, mei, juni, august
september, november og desember
Haldaragjald: kr. 200,00